# Grót á rull í Klaksvík

**- Vit mugu taka okkum saman og gera okkurt við umstøðurnar hjá tónleikarum í Klaksvík. Um okkurt ikki verður gjørt skjótt, so dettur tónleikurin púra niðurfyri**



*Á fundinum vóru umboð fyri bæði Grót og FUT, eins væl og borgarstjórin sjálvur eisini var til staðar.*

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Hetta var bert ein av teim mongu viðmerkingunum, sum komu fram á fundinum í Býráðshøllini síðsta fríggjakvøld.

Tað var tónleikasamtakið Grót, ið saman við øðrum, hevði tikið stig til fundin.

### Stovna lokalfelag í Klaksvík

Ætlanin við fundinum var, at taka stig til stovnan av einum lokalum tónleikarfelag í Klaksvík.

- Vit vita, at tónleikurin hevur alt ov vánaligar karmar í Klaksvíkini, men sum heild er hetta ikki nakað, ið býráðið kann gera nakað við. Vit í býráðnum høvdu tí verið sera fegnir, um eitt tónleikarfelag hevði verið sett á stovn skjótast gjørligt. Hetta felag hevði kent umstøðurnar betri, enn vit í býráðnum gera, og hevði av tí sama havt betri fortreytir til at ment um tónleikarlívið, byrjaði Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, fundin.

Við á fundinum vóru eisini umboð fyri tónleikasamtakið Grót, eins væl og umboð fyri FUT eisini var til staðar.

Uppgávan hjá teimum var at leggja klaksvíkingum lag á, soleiðis at lokalfelagið kundi setast á stovn skjótast gjørligt.

### Vánaligar umstøður

Um 25 tónleikaáhugaðir klaksvíkingar høvdu leitað sær inn í býráðshøllina hetta kvøldið, og fingu teir eisini høvi til at siga sína hugsan um umstøðurnar hjá tónleikinum í Klaksvíkini.

Og støðan hjá teimum var greið: Umstøðurnar hjá tónleikinum í Klaksvík eru ikki av teim bestu. Hølini eru alt ov fá og ov vánalig, og eftir at dansistaðið Lognbrá fyri einum ári lat aftur, eru møguleikarnir fyri at framføra sín egna tónleika so at siga ikki til staðar.

- Um tónleikurin skal mennast, so skal venjast, venjast og aftur venjast. Og so leingi sum eingi venjingarhøli eru til staðar, so ber illa til at venja. Foreldrini hjá ungum tónleikarum hvørki orka ella tíma at hoyra trummur buldra í kjallarinum kvøld eftir kvøld, sum tann eini áhoyrarin segði.

Ein av teim yngri áhoyrarnum hevði eisini sína hugsan um núverandi støðuna:

- Um ein bólkur endiliga finnur eitt spælistað, har teir kunnu framføra sín egna tónleik fyri áhoyrarum, so eru tað so nógv onnur ting, ið skulu upp á pláss, áðrenn farið kann vera undir sjálva framførsluna. Og sum tónleikari kann tað vera trupult eisini at finna orku til at skipa fyri øllum hesum. Tí hevði tað verið gott at havt eitt felag, sum kundi tikið sær av hesum, umframt eisini at funnið spælistøð og venjingarhøli. So hevði ein sum tónleikari bara tónleikin at hugsað um.

### Stórur áhugi

Áhugin fyri at seta á stovn eitt lokalt tónleikarfelag var heilt stórur millum tey uppmøttu.

Hetta felag skuldi so havt til uppgávu at ment um tónleikarlívið við at funnið venjingarhøli, spælistøð og eisini tikið sær av øllum tí praktiska, ið hoyrir við til tónleikin.

Og tá spurt var, um nakar av áhoyrarunum vildi geva eina hjálpandi hond í stovningini av einum slíkum felagi, var einki at ivast í. Nærum øll reistust og skrivaðu navn sítt á ein lista, sum stigtakararnir av fundinum tóku heim við.

Teir komandi dagarnar verður so hugt nærri at hesum lista, og spyrst vónandi okkurt ítøkiligt burturúr.

### Stovningarfundur

Á fundinum varð eisini avgjørt, at ein stovningarfundur av einum tónleikarfelagi í Klaksvík møguliga verður skipaður longu komandi vikuskiftið.

Umboðini frá Grót og FUT vilja fegnir koma norður aftur til ein stovnandi fund, og eru teir eisini sinnaðir til at geva eina hjálpandi hond ta fyrstu tíðina.

- Vit vita, at tørvur er skipaðum viðurskiftum viðvíkjandi tónleikinum. Hetta gevur betri møguleikar fyri framførslum, venjingarhølum og ikki minst er eitt felag ótrúliga mennandi at hava. Og vit vilja fegnir hjálpa til, um tøvur er á tí, greiddi Jón Tyril, formaður í tónleikasamtakinum Grót, frá.

### Samstarv við Grót

Fyribils er ætlanin, at komandi felagið skal samstarva við tónleikasamtakið Grót.

Harafturat eru ætlanir eisini um at stovna eitt tónleikafelag í Havn, og skulu hesi trý feløg eisini samstarva við FUT, ið er Føroya Undirhalds Tónleikarafelag.

Tónleikasamtakið Grót varð stovnað í Eysturoynni í 1998, og hevur samtakið havt stór árin á tónleikalívið har um leiðir.

- Hetta sama kundi hent í Klaksvík. Vit í Grót hava ikki orku til at taka okkum av Klaksvíkini eisini, men vit halda, at klaksvíkingar skulu hava sítt egna felag. Hetta hevði ríkað ótrúliga nógv um menturnarlívið, segði Jón Tyril, formaður í Grót, at enda.



*Øll, ið høvdu hug at hjálpa til, settu navn sítt á ein lista*


PÁSKATILBOÐ
fráferð: 22. ella 29. mars



Frítíðaríbúðir/Summarhús:
Danland
2 vaksin & 2 børn í bili úr 4.495,-

Frítíðaríbúðir/Summarhús:
Dansk Folkeferie
2 vaksin & 2 børn í bili úr 5.595,-

fyri hvønn, við 2 ferðandi í bilinum

Hotel:
Hotel Excelsior - Keypmannahavn úr 3.795,-
Park Hotel - Álborg úr 3.350,-

Íroknað prísin er:
Ferðin fram og aftur við Norrönu í 4-koyggjukamari og uppihald á staðnum í 7 nætur.

galdandi til og við 3. mai 2002
2 fyri 1
ferðist tvey gjaldið fyri ein!

Tilboðið er fyri túrin fram & aftur við bili í 2-koyggjukamari v. WC/bað

bara 2.990,-

team85

SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
E-mail: booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo




# Ótolandi læknaviðurskifti í Sandoynni

**– Støðan er undir alt lágmark og vit kunnu ikki liva við hesum. Okkurt má og skal henda nú, soleiðis at vit fáa fastan kommunulækna. Tað er als ikki nøktandi heldur at hava skiftandi avloysarar, sigur Gerard Lognberg, borgarstjóri í Skopun**



*– Trupulleikin er, at tá ið vit hava ein fastan lækna í oynni, møða vit hann inn at beini í arbeiði, sigur Gerard Lognberg, borgarstjóri í Skopun*

LÆKNALOYSI
*Turið Kjølbro*

Sandoyggin liggur enn eina ferð í læknaloysi. Síðani seinasti kommunulæknin í føstum starvi fór av oynni í starv í Havn seinasta heyst, hevur oyggin við nærum 2000 íbúgvum havt ymsar avloysarar, men til tíðir ongan lækna. Soleiðis er eisini statt hesa vikuna, til fríggjadagin, tá enn ein avloysari kemur í eina viku.

– Vit eru alt annað enn nøgd og glað. Viðurskiftini eru ótolandi og sera ótrygg. Støðan er undir alt lágmark og vit kunnu ikki liva við hesum. Okkurt má og skal henda nú, soleiðis at vit fáa fastan kommunulækna. Tað er als ikki nøktandi heldur at hava skiftandi avloysarar, sigur Gerard Lognberg, borgarstjóri í Skopun.

Lítið munar hjá kommununum í oynni at leggja trýst á Almanna- og heilsumálastýrið um at fáa ein ella fleiri læknar í oynna sum skjótast. Í Almanna- og heilsumálastýrinum arbeiða tey av øllum alvi við at útvega læknar til ósettu kommunulæknastørvini í Føroyum.

– Vit vita, at viðurskiftini eru ótolandi, men tað er ómetaliga trupult at útvega kommunulæknar. Vit royna alt vit kunnu, lýsa eftir læknum alla tíðina, og seta okkum í samband við læknar, men lítið nyttar, sigur Maria á Dul, starvsfólkaleiðari í Almanna- og heilsumálastýrinum.

### Støðan versnað

Fyri nøkrum árum síðani vóru tveir kommunulæknar í Sandoynni, og teir høvdu viðtalu í fleiri bygdum í oynni. Síðani fór annar læknin og eftir tað, varð læknaviðtalan miðsavnað.

– Læknaviðurskiftini eru bara versnað síðani. Frá at hava tveir læknar, til nú, vit ongan hava í heilum. Trupulleikin er sjálvsagt, at tá ið vit hava ein fastan lækna í oynni, møða vit hann inn at beini í arbeiði. Hann skal verða tøkur alt døgnið alla vikuna og sleppur í grundini ikki av oynni ella aðra staðni, tí arbeiðið er so bundið og køvandi. Til endans vita teir sær bara ein útveg og tað er at sleppa sær avstað. Tí meta vit, at tað er skilabetri, at aðrir læknar í landinum avloysa kommunulæknan í vikuskiftinum, sigur Gerard Lognberg.

Borgarstjórin í Skopun fílist á, at tá læknaavloysari kemur í oynna, verður læknaskrivarin, sum hevur arbeitt í yrkinum í nógv ár og kennir fólk og viðurskifti, send til hús.

– Hevur læknin konu, sum er eitt nú sjúkrasystir, skal hon røkja skrivarastarvið og fasti læknaskrivin verður sendur heim. Hetta halda vit ikki er rætt og rímuligt, sigur Gerard Lognberg.

### Í bíðirøðina

Hava fólk í Sandoynni brúk fyri lækna her og nú, mugu teir venda sær til kommunulækna í Havn. Har koma fólk síðani í bíðirøðina, sum er har.

– Vit kunnu ikki annað enn vísa til grannalæknarnar. Samferðsluviðurskiftini eru so mikið góð í dag, at fólk rímuliga skjótt kunnu fáa læknahjálp, um á stendur. Teistin siglir, eisini í vaktarskipan um kvøldið, næturnar og vikuskiftið, og tyrlan kann eisini nýtast. Metir læknin í Havn, at fólk hava tørv á lækna beinanvegin, verður tyrlan brúkt, sigur Maria á Dul.

Arbeiðsbólkur, sum er samansettur av fólki úr Almanna- og heilsumálastýrinum og kommunulæknum, arbeiðir í løtuni við at gera eina vaktarskipan, sum tekur atlit at øllum læknaviðurskiftunum í landinum.

### Lønandi

Sandoyggin hevur framvegis tveir læknastørv.

– Málið er sjálvsagt, at bæði størvini verða sett. Arbeiðsbyrðan í Sandoynni svarar til eitt kommunulæknastarv, men tvey størv eru normerað orsakað av vaktarbyrðuni. Í mun til aðra staðni fær kommunulæknin í Sandoynni betri løn enn aðrir kommunulæknar í landinum. Hann fær nevniliga dupult grundgjald frá tí almenna, tí vaktarbyrðan svarar til tvey størv, sigur Maria á Dul.

Fríggjadagin avloysir Annfinn Rubek Nielsen læknastarvið í Sandoynni. Hann verður í eina viku, tá ið ein dani kemur. Hesin verður fyribils í tríggjar mánaðir.

– Tíðarskeiðið er avmarkað til tríggjar mánaðir, tí læknin hevur ikki verið í Føroyum fyrr, sigur Maria á Dul.

Í Klaksvík eru tvey av fýra kommunulæknastørvum ósett. Fjóðra kommunulæknastarvið í Klaksvík er játtað, men er ongantíð lýst leyst orsakað av vantandi hølum. Í triðja starvinum er avloysari av og á. Eitt ósett kommunulæknastarv er á Eiði.



*– Tað er ómetaliga trupult at útvega kommunulæknar. Vit royna alt vit kunnu, lýsa eftir læknum alla tíðina, og seta okkum í samband við læknar, men lítið nyttar, sigur Maria á Dul, starvsfólkaleiðari í Almanna- og heilsumálastýrinum*


GRAMEX
Útgjalding úr Gramex-grunninum

Heitt verður á øll, ið framleiða føroyskar plátur, bond og ljómfløgur, um at senda skjalprógvað tilfar um, hvussu nógvar eindir av LP/MC/CD hvør einstakur framleiðari ella virki hevur framleitt í tíðarskeiðnum 01.01.2001 til 31.12.2001.
Upplýsingarnar kunnu vera váttan frá veitaranum um, hvussu nógvar eindir av hvørjum verki eru gjørdar. Avrit av fakturum yvir eindirnar kunnu eisini góðtakast.

Eru ivamál hesum viðvíkjandi, kunnu tit ringja til:
Gissur Patursson
Tlf. 319820/213535, fax 314955
Kristian Blak,
Tlf. 314815/225034, fax 314825
Hans Pauli Torgarð
Tlf. 312043/221638, fax 318617

Mannagongdin er síðani, at allar eindirnar verða taldar saman í stigum, ið so verða nýtt, tá samlaða upphæddin frá GRAMEX skal býtast.

Sjálv útgjaldingin verður í feb/mars 2002.

Alt tilfar skal sendast til:
Framleiðslufelagið • Postboks 1057 • FO-110 Tórshavn

Minnist til hesar váttanir:
1. Váttan um framleiddar eindir
2. Avrit av faktura
3. Váttan frá studio um tal av eindum ella tvítøkum

Seinasta freist fyri innlating er 16. februar 2002